

www.oljan.fo

**Jan Müller** 15 - 05 - 2012

# Oljan kanska tvær ferðir so dýr um 10 ár

Ein kanning, sum Altjóða Gjaldoyragrunnurin IMF hevur gjørt, kemur til ta niðurstøðu, at oljuprísurin kann hækka heili 100 prosent hetta til 2022. IMF ávarar um, at minkandi vøkstur í útboðnum og støðugt hækkandi prísur á ráolju kunnu elva til sera stórar trupulleikar fyri heimsbúskapin. Tað skrivar bretska blaðið The Telegraph. -Okkara forsøgn sigur, at oljuframleiðslan fer at veksa, men í smáum, og tað fer at gera, at prísurin verður næstan tvífaldaður tað næsta tíggju ára skeiðið, skrivar IMF í niðurstøðuni og leggur afturat, at gongdin fer at fáa stórar avleiðingar fyri vøksturin í bruttotjóðarframleiðsluni. Fyrr í ár kom prísurin á einari tunnu av Brent-olju upp í 120 dollarar, men nú liggur hann um 110 dollarar.